KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

# *Vegleiðing í sambandi við andlát og jarðarferð*

Við deyða og jarðarferð er so mangt, ið avvarðandi hava at hugsa um. Hetta er ætlað sum ein leiðbeining til tað, ið er mest neyðugt at fyrireika.

Í sambandi við andlát skulu avvarðandi seta seg í samband við fyristøðukvinnuna, helst millum kl. 10-12, tel. 455463, lokal 106 ella 107.

Í vikuskiftinum skal ringjast til deild A, tel. 455463, lokal 500, ella deild M, lokal 400.

## Kista og líkverja

Vanliga bíleggur sjúkrahúsið kistu og líkverju. Fyristøðukvinnan skal hava upplýsingar um navn og bústað hjá avvarðandi, ið skal standa fyri og gjalda kistuna og líkverjuna. (Ávíst endurgjald fæst frá Norðoya Sjúkrakassa). Vanliga verður lokið lagt á kistuna ein tíma áðrenn farið verður úr kapellinum.

## Bønarhald

Vanligt er, at bønarhald er í kapellinum á sjúkrahúsinum (hetta avgera avvarðandi sjálvi). Í hesum sambandi avgera avvarðandi nær bønarhaldið skal verða, og skulu tosa við prest ella talara, sum skal tosa á bønarhaldinum. Saman avgera tit, nær bønarhaldið skal verða, og boðað fyristøðukvinnuni frá hesum, og hvør sálma/songbók skal nýtast.

## Lýsingar

Ringja ella faxa inn og lýsa andlát í Útvarpi Føroya. Útvarp Føroya hevur tel. 342000 og fax 342001.

**Gravarar**
Avtala skal gerast við gravarar tel. 226377. Gravarar skulu hava boð, áðrenn jarðarferðin verður kunngjørd.

**Líkbilur**
Avvarðandi bíleggja sjálvi líkbil. Líkbilur í Klaksvík Hans Andrias Johannesen, tel. 455225 og 226355.

**Í kapellinum**
Avtala skal gerast við 6 berarar av kistuni, við urguleikara og møguligar sangarar.

**Kirkja/samkomuhús**
Avtala skal gerast við prest/talara, sum síðani vegleiðir tykkum.

**Sangir til jarðarferðina**
Avtala kann gerast við prentsmiðju skjótast tilber.

**Børuprýði**
Ynskja tit børuprýði, skulu tit sjálvi bíleggja tað.
Summardáin tel. 456193 ella Blómuhandilin Flora tel. 455115.

**Fráboðan**
Fyristøðukvinnan boðar myndugleikunum, presti og sýslumanni frá andlátinum.

*Við samkenslu*